# Bilar

Nr. 1 • hósdagur • 3. januar 2002 • 75. árg.


# Grand Vitara XL7 – Suzuki til sjey ferðandi

**Suzuki eru mest kendir fyri at gera smáar persónbilar og jeepar, ið hava gott umdømi sum orkusparandi og álítandi bilar. Umframt at Grand Vitara hava verið gjørdir í tveimum útgávum við 3 og 5 hurðum, er nú ein 7 persónabilur komin á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Grand Vitara XL7 er 49 cm longri enn tann vanligi Grand Vitara við 5 hurðum*

Suzuki er júst nú komin á marknaðin við 7 persónabilinum Grand Vitara XL7. Við tað at bilurin er 49 cm longri enn tann vanligi Grand Vitara við 5 hurðum, verður pláss til eitt eykasetur aftast. Tá aftastu setrini verða tikin út, er viðførisrúmið 790 litrar. XL7 er ein rúmligur 7 persónabilur, sum einans fæst við 2,7 litra V6 motori við 173 hk.

**Fæst sum vørubilur**
XL7 er ein stórur og rúmligur bilur. Ramman sum bilurin er settur omaná, er soleiðis gjørd, at ongar ristingar og vibratiónir merkjast á ósløttum undirlendi, eins og alt er væl goymt undir bilinum fyri at verja ímóti skaðum. V6 motorurin ger eisini sítt til at bilurin virkar lættur at umgangast. Talan er um ein luksusbil, har næstan øll útgerðin er standard, vit kunnu til dømis nevna ABS bremsur við EBD, aircondition, elektroniskt stýrda ventilatiónsskipan, fartpilot, el-drivnar síðurútar, el-drivin síðuspegl og sentrallás við fjarstýring. XL7 fæst eisini við automatiskum gearum og kann leverast sum vørubilur

**Seinni sum turbodiesel**
Frá bilasøluni hjá Eyðbjørn Hansen verður sagt, at av tí at Grand Vitara XL7 einans fæst við V6 motori, hava teir ongan bil á goymslu, men teir kunnu altíð útvega ein XL7, um onkur ynskir tað. Væntandi kemur hann seinni sum turbodiesel, eins og tann minni Grand Vitara, ið hevur ein 109 hk Peugeot turbodiesel motor. Grand Vitara røðin fæst nú fæst í medium, large og ekstra large. Suzuki Grand Vitara eru mest seldu 4x4 bilar í Danmark.



*XL7 tekur seg væl út. Í fyrstu atløgu fæst hann einans við 2.7 ltr. V6 motori*

SUZUKI

## Suzuki Grand Vitara XL7 2,7 V6

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.7 ltr. V6 24V 173 hk |
| 0-100 km/t | 13.3 sek |
| Bensinnýtsla | 9,3 km/l |
| Dekkstødd | 235/60-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 468.5 cm |
| Breidd | 178.0 cm |
| Hædd | 174.0 cm |
| Eginvekt | 1575 kg |
| Totalvekt | 2250 kg |
| Søluumboð | Sp/f Eyðbjørn Hansen Bilasøla og verkstaður Varðagøta 75 FO-100 Tórshavn Tlf: 313375 |



*Aftan er ikki tann stóri munurin, uttan tað at bilurin er rúmligari, og 2 sitipláss eru komin afturat*



*Suzuki Grand Vitara eru mest seldu 4x4 bilar í Danmark*



ÚT AT KOYRA

## Tendri-proppurin 100 ár




7.januar eru liðin hundrað ár síðan Robert Bosch fekk patent uppá tendriproppin, sum hann hevði uppfunnið og framleitt. Livitíðin hjá teimum fyrstu tendriproppunum var 1.000 km.
*Kelda: Motor Magasinet*

## Jubileums tendri-propp til Lupo



Í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið fyri Bosch tendriproppinum, hava teir gjørt eitt heilt nýtt slag av tendriproppum til VW Lupo FSI við beinleiðis bensininnspræning.
*Kelda: Motor Magasinet*

## Focus "facelift"



Ford Focus 2002 hava fingið eina lættari "facelift" við til dømis nýggjum lyktum og kúfangarum.
*Kelda: Motor Magasinet*

# Samanbrestur við 50 km/t – sum at detta út av 3. hædd

**Í einum heitum og góðum bili er so lætt at undirmeta ta álvarsligu hóttandi styrki, sum tann nógva ferðin ber í sær, um og tá ið ein vanlukka rámar. Um vit sammeta megina í einum samanbresti við 50 km/t, so samsvarar hon við at tú dettur út av 3.hædd í einum húsum og niður á asfaltið. Vit mugu øtast - bert við hugsanina**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Tað er kanska lætt at fata, hví vit undirmeta, at ein vanlukka kann standast av bilkoyring, tí tað er jú lítil vandi fyri at verða skaddur ella doyggja hjá tí einstaka bilføraranum, sum bert koyrir frá A til B. Men hesin trupulleiki verður harafturímóti stórur, tá hugsað verður um allar íbúgvar landsins. Løgið kortini, at vit dagliga tora at undirmeta ta øgiligu "fallstyrki", sum er fjald í einum bili, ið bert koyrir 50 km/t.

**Brúka trygdarbeltini**
Men sjálvt um henda "fallstyrkin", ið verður fleiri ferðir størri tá ferðin veksur, dagliga liggur mestsum og lúrir í bilinum, tá ið vit koyra, so eru tað tó mong, ið tora at sita enntá við t.d. ongum trygdarbelti. Vit kunnu í hesum viðfangi nevna, at nágreiniligar vitskapligar kanningar eisini hava staðfest, at avleiðingarnar av eini ferðsluvanlukku verða helvtina minni hjá tí sum brúka trygdarbeltið.
*Kelda: Petur J.Sigvardsen RFF*




*Myndin vísir at ein samanbrestur við 90 km/t er sum at detta út av 10.hædd*

# Vatnleiðingsbrot í Tórsgøtu



*Mynd lænt frá Birgar Johannessen*

**Í Tórsgøtu og Steinatúni er nógv broytt seinastu 30 árini. Hendan myndin er tikin fyri umleið 30 árum síðan, meðan vegarbeiði fór fram í Tórsgøtu**

GOMUL BÝARMYND
*Magnus Gunnarsson*

Hol er komið á eina vatnleiðing, og vatn sproytar upp í loft. Húsini vit síggja, er matvøruhandilin hjá Karl hjá Vág Heina. Bilar koyra á vegnum ímillum handilin og Føroya Banka. Á veg oman gjøgnum Tórsgøtu kemur ein Nissan Clipper lastbilur. Hinir bilarnir eru frá vinstru: Ein Ford Anglia stationvognur, ein Saab 96 og ein VW Type 1 (Boblan).




**Renault Megane 1.6**
bensin, frá 04/2001 - selji vegna flyting. 4 airbags, aircondition, alu-felgur, hiti í setrum, CD-spælari, tráleyst sentrallás o.a. Prísur 145.000.
*Tlf. 311541 & 224625*